Búskapur og vinna:

## Fáa minni burturúr

Tann svikaligi partabræva- og virðisbrævamarknaðurin hevur eisini sína ávirkan á tann almenna norska oljugrunnin. Ein útrokning vísir, at virðið á partabrøvum og virðisbrøvum hjá grunninum er fallið 3,5 prosent teir seinastu tríggjar mánaðarnar. Hetta er ikki í samsvari við tað, sum fíggjarmálaráðið í Oslo hevði væntað, og sambært fjølmiðlum verður úrslitið hjá grunninum einar 30 - 40 milliardir krónur verri í ár, enn fíggjarmnálaráðið hevur mett.

## Rukku málinum

Fyri fyrstu ferð í ár fall inflasjónin í teimum 15 ES-londunum niður um tvey prosent í mai. Í apríl var inflasjónin 2,2 prosent, men í mai fór hon niður á 1,8 prosent. Í Danmark var hon 1,9 prosent. Hon var 2,2 prosent í apríl.

Prísvøksturin í síðsta mánað var størstur í Írlandi, sum umroknað til árstøl svaraði til eina inflasjón uppá fimm prosent í ár. Í Grikkalandi og Niðurlondum var tilsvarandi talið 3,8 prosent, meðan Bretland og Týskland lógu í hinum endanum við ávikavist 0,8 og 1,0 prosenti.

## Fiskurin spillist

Vandi er nú fyri, at 335 tons av fiski umborð á einum russiskum trolara, sum liggur í havnini í Rønne á Bornholm, fara at spillast. Russiska skipið hevur ligið í Rønne síðani í oktober í fjør. Danska fakfelagið SID sýtir fyri, at skipið verður avgreitt, tí teir 24 russisku sjómenninir hava ikki fingið hýru frá sínum reiðarii.

At skipið ikki verður avgreitt, merkir m. a., at eingin olja verður latin umborð, og nú er so lítið av olju eftir, at frystaríið klárar illa at halda teimum neyðugu 18 kuldastigunum. Tí er nú vandi fyri, at fiskurin spillist. Altjóða flutningsarbeiðarafelagið sigur, at hetta kann elva til eitran, og at tað tí kann gerast neyðugt at taka manningina av skipinum.

**UTTAN ÚR HEIMI**

# 30.000 flýdd undan skógareldi



*Eitt húski hyggur her at skógareldinum, sum nærkast heimi teirra. Higartil eru 180 hús í Arizona farin upp í royk*

**Skógareldurin í amerikanska statinum Arizona er tann størsti, sum nakrantíð hevur verið har**

SKÓGARELDAR
*Árni Joensen:*

Myndugleikarnir í amerikanska statinum Arizona siga nú, at skógareldurin, sum hevur herjað statin seinastu dagarnar, er vorðin tann størsti, sum menn vita um at siga.

Sambært myndugleikunum eru 130.000 hektarar av skógi farnir upp í royk, og nógvastaðni hava fólkverið noydd at taka til rýmingar undan eldinum. Í gjár varð sagt, at umleið 30.000 fólk eru farin heiman við tí, sum tey fingu pláss fyri í bilinum, og sløkkiliðsmenn siga, at umleið 180 hús eru oyðiløgd í eldinum. Í statinum Colorado er eisini skógareldur, og har eru 115 hús farin upp í royk.

Samstundis verður víst á, at skógareldar gerast alt vanligari í USA, og at eldarnir eru ógvusligari nú enn fyrr, og árið í ár sær út til at gerast tað ringasta nakrantíð. Sambært myndugleikunum eru 930.000 hektarar av skógi brendir higartil í ár, og tað er meiri enn tvær ferðir so nógv sum seinastu tíggju árini í meðal.

Hetta hevur fingið summar amerikanarar at mæla til at rudda stór skógarøki og at nýta jørðina til landbúnað ístaðin, men hesum hevur eitt nú timburvinnan víst aftur.

# Ísrael í øðini inn á CNN

**Ísraelska stjórnin heldur, at sjónvarpsstøðin CNN er antiísraelsk og eggjar til yvirgang**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen:*

Fyritøkur, sum útvega ísraelskum sjónvarpshyggjarum sendingar ígjøgnum fylgisvein ella kaðal, eru í ferð við at taka amerikansku sjónvarpsstøðina CNN av skránni. Ístaðin skulu hyggjararnir fáa tíðindi frá onkrari aðrari sjónvarpsstøð.

Orsøkin til hetta er, at ísraelska stjórnin er sera misnøgd við CNN og tíðindaflutningin um tað, sum hendir í Miðeystri. Stjórnin vil vera við, at CNN hevur antiísraelskar áskoðanir, og at støðin harafturat eggjar palestinum til at fremja yvirgang.

Hetta er ikki nakað nýtt fyribrigdi, men tað, sum fekk bikarið hjá ísraelsku stjórnini at flóta yvir, var tað, sum CNN-stovnarin, Ted Turner, segði við bretska blaðið The Guardian í síðstu viku. Í samrøðuni segði Ted Turner, at tann yvirgangurin, sum ísraelsmenn fremja ímóti palestinska fólkinum er einki mætari enn tær palestinsku sjálvmorðsbumbuatsóklnirnar ímóti ísraelsmonnum.

Orðini fingu rættiliga øði í ísraelska kunningarmáláráðharran, Reuven Rivlin. Við blaðið Haaretz segði hann, at stjórnin umhugsar, hvat hon skal gera við CNN-tíðindamenninar, sum eru í Ísrael.

Úr Norðurlondum:

## Fann gull

Tað eru tey, sum hava til ítriv at leita eftir metalum í jørðini, og hjá teimum hepnu kann hetta ítrivið gerast gullvert.

Soleiðis var hjá norðmanninum Sigbjørn Johnsen. Fyri tveimum árum síðani kom hann fram á gull, men av góðum grundum vil hann ikki siga, hvar hann fann gullið, og tí hevur eingin frætt um hetta fyrr enn nú. Sigbjørn Johnsen hevur kortini havt samband við eitt jarðfrøðisavn í Tromsø, og har sigur jarðfrøðingurin Per Bøe, at talan er um so mikið av gulli á staðnum, at tað er als ikki óhugsandi, at tað kann loysa seg at útvinna tað. Sambært Per Bøe hevur Sigbjørn Johnsen verið heppin, tí tað er sjáldsamt at finna gull, ið er so sjónligt í náttúruni.

## 65 prosent fyri ES

Ein meiningakanning í Danmark vísir, at danir eru nøgdir við limaskapin í ES. Heili 65 prosent svara, at tey høvdu atkvøtt fyri limaskapi í dag. 31 prosent siga nei, og tey seinastu fýra prosentini eru í iva. Samstundis vísir kanningin, sum fakligi landsfelagsskapurin hevur skipað fyri, at 62 prosent taka undir við, at londini í Eysturevropa koma upp í ES. 24 prosent eru ímóti.

Tað er lítið at ivast í, at úrslitið kemur donsku stjórnini væl við, nú Danmark um fáar dagar tekur við formansskapinum í Evropasamveldinum.

## Umhugsa alt

Danska løgreglan tykist fyrireika seg sera væl til møgulig mótmæli í Keypmannahavn, tá ES fer at halda toppfund í býnum í heyst. Í gjár kom fram, at løgreglan eisini umhugsar at flyta umleið 1000 gomul fólk úr ávísum býarpørtum, gerst tað neyðugt hjá løgregluni at steingja gøturnar fyri at forða ófriðarligum mótmælisgongum. Tí hava myndugleikarnir skipað so fyri, at pláss verður at flyta tey gomlu á røktar- og ellisheim.

# ítróttur

Nr. 118 • týsdagur • 25. juni 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

# Kappingarnevndin kærd fyri dómsnevndini

**Skálamenn vóru ikki nøgdir við avgerðina, sum kappingarnevndin gav umbønini um at fáa rumensku spælararnar at spæla á Sevmýri, men teir fingu ikki viðhald frá dómsnevndini**



*Fótbóltsreglurnar mugu fylgja reglunum í samfelagnum sum heild, sigur Ísak Mikladal, aðalskrivari í FSF, sum annars er fegin um, at júst hesin spurningurin nú er royndur hjá dómsnevndini*

KÆRA
*Jóannes Hansen*

Tað var stórt virksemi í føroyska fótbóltsheiminum upp undir vikuskiftið og serliga upp undir sera týdningarmiklu uppgerðina á Sevmýri ímillum uppflytararnar báðar, sum manna tvey tey niðastu plássini á støðutalvuni.

Í øllum stillum vildi TB hava spæliloyvið hjá Óla Johannesen úr Hvidovre og til Tvøroyrar. Óli Johannesen er leysur av Hvidovre, nú kappingin í Danmark er liðug og sáttmálin millum hann og danska 1. deildarfelagið er farin úr gildi. Tvørámenn søgdu, at Óli var komin til Tvøroyrar í summarfrí, og at teir fingu at síggja, hvussu tað fór at verða við fótbótsspælinum hjá honum. Men tá Skála og TB hitaðu upp sunnudagin, var Óli Johannesen ímillum teir fyrstu ellivu hjá TB. Einki bein var í flytingini. Á síðu 94 í skipanini stendur, at fyri at útskriva loyvisbræv til spælara við føroyskum borgararætti til Føroya, at viðkomandi felag í Føroyum biður FSF um loyvisbræv til viðkomandi. Við umbønini skal upplýsast navn, føðingardagur, bústaður í útlandinum, navn á útlendska felagnum og landinum. FSF søkir síðan avvarandi fótbóltssamband um leysgeving. Tá leysgeving frá útlendska fótbóltssambandinum fyriliggur hjá FSF, verður loyvisbræv útskrivað.

Soleiðis siga ásetingarnar, og sambært Ísak Mikladal, aðalskrivara í FSF, vóru eingir trupulleikar hjá teimum at fáa spæliloyvi hjá Óla Johannesen flutt úr Danmark og til Føroya.

### Bústaðurin

Verri royndist tað hjá skálamonnum, sum stríddust við at fáa teir tríggjar rumenarnar, ið eru komnir til Skála at spæla fótbólt, tøkar til uppgerðina á Sevmýri. Tað eydnaðist ikki. Kappingarnevndin segði nei, og tá Skála leygardagin legði málið fyri dómsnevndina, var svarið eisini nei.

Spurningurin um uppihaldsloyvi og arbeiðsloyvi var ikki avgreiddur hjá danska útlendingastýrinum. Tað hevði við sær, at tað ikki bar til at fáa p-tal og fastan bústað í Føroyum.

– Vit kærdu avgerðina hjá kappingarnevndini til dómsnevndina, tí vit hildu, at vit høvdu formligu krøvini á okkara síðu, og vit vildu hava eina prinsipiella avgerð.

Tað sigur Kurt Rasmussen, formaður í Skála Ítróttarfelag. Hann sipar til grein 17 og annað stykki í kappingarreglunum. Har eru orðingarnar kanska eitt sindur mótstríðandi. Í endanum stendur, at útlendskur leikari í øllum deildum uttan 1., 2., 3. og 4. deild menn og 1. deild kvinnur kann fáa loyvisbræv, tá hann er skrásettur í fólkayvirlitinum sum fluttur til Føroya. Um spælarar í 1., 2., 3. og 4. deild og 1. deild kvinnur verður sagt, at við umsókníni skal fyriliggja skrivlig váttan frá leikaranum og felagnum, hann leikar við, um ætlaðu flytingina. Harafturat skal fylgja við um váttan frá útlendska fótbóltssambandinum fyriliggur um, at viðkomandi leikari er leysgivin til Føroya.

– Fyri tveir av rumensku spælarunum hava vit fingið spæliloyvi henda vegin. Vit hildu ikki, at kravið um fastan bústað var galdandi í hesum førinum, og tí kærdu vit avgerðina hjá kappingarnevndini. Men vit fingu ikki viðhald, og so arbeiða vit við at fáa viðurskiftini í rættlag inntil næsta dystin. Hann verður annað mikukvøld ímóti B68, sigur Kurt Rasmussen.

Ísak Mikladal, aðalskrivari í FSF, er fegin um, at júst hesin spurningurin varð royndur hjá dómsnevndini.

– Tá aðalfundurin broytti grein seytjan var tað tíðarfreistin, sum tað snúði seg um. Í staðin fyri 31. mai varð síðsta freist fyri fráboðanini um útlendskar spælarar flutt til 10. august. Í upprunaliga uppskotinum vóru lægru vaksnamannadeildirnar ikki við, men tær komu við eftir broytingaruppskot á fundinum. Tað vil siga, at um t. d. ein útlendskur lærari kemur henda vegin um miðjan august, og hann hevur hug at spæla fótbólt í 3. ella 4. deild, so hevur hann ikki loyvi til tað, um flytingin ikki er avgreidd innan 10. august. Fótbóltsreglurnar mugu fylgja reglunum í samfelagnum sum heild. Tað er ikki loyvt at arbeiða í Føroyum, um ein persónur ikki hevur uppihaldsloyvi og arbeiðsloyvi og bústað í Føroyum. Kappingarnevndin góðtekur avrit av bláa persónstalskortinum sum prógv um, at formellu viðurskiftini eru í lagi. Men tað ber ikki til at fáa hetta í lagi, fyrrenn viðurskiftini við Útlendingastýrið og fólkayvirlitið eru fingin upp á pláss. Fyri at eingin ivi skal vera, so hava vit á síðu 94 í kappingarskipanini gjølla útgreinað, hvussu tað skal farast fram, tá útlendskur spælari kemur til Føroya. Eg havi ikki sæð niðurstøðuna hjá dómsnevndini, men eg kann bara staðfesta, at teir hava hildið seg til somu fatan av tingunum, sum kappingarnevndin hevur gjørt, sigur Ísak Mikladal, aðalskrivari í Fótbóltssambandinum.